

eitt hár losnaði og datt í vatnið; hann skundaði sær at taka tað upp aftur, men tá var tað longu tað bera gull, so tað glitraði í sólini. Tá ið villmaðurin kom aftur um kvøldið visti hann longu hvat hent var og segði við drongin: »Tú hevur mist eitt hár í brunnin; eisini hesa ferð skal eg tilgeva tær; men hendir tað eina ferð afturat, hevur tú dálkað mær vatnið so, at eg kann ikki hava teg her longur.«

Triðja dagin setti drongurin seg so stillan, at hann rørdi ikki ein fingur, hóast sviðin kom aftur. Men tað fall honum so langligt at sita har, at hann til stuttleika fór at spegla sær í vatninum, helti seg meir og meira framyvir, so hann rættiliga kundi síggja inn í eyguni á sær sjálvum, men smátt verið tí fyri, hansara langa hár datt fram yvir og alt sum tað var niður í vatnið. Hann leyp upp; men tá var longu ov seint, hárið var tað bera gull, tað glitraði og skein í sólini. Tit kunnu ætla, at tá var drongurin heilt hjartkiptur; hann tók lummaklútin og bant um høvdið at fjala hárið. Tá ið villmaðurin kom um kvøldið, visti hann longu hvat ið hent var, sigur við drongin: »Tak klútin av høvdinum!« Hann so gjørdi. Tá floymdi gullhárið niðuryvir hann, og tað batti einki hvussu hann umbar seg. Villmaðurin segði við hann:

»Tú hevur ikki lokið treytirnar og tú kann ikki verða her longur, far nú út í ta víðu verð og lær at kenna, hvat fátækt hevur at týða. Men av tí tú er ein hjartagóður drongur og eg vil tær væl, skal eg lova tær eitt: Um tú kemur í neyð, far tá út á skógin og rópa Jarnhanus; tað eri eg, so skal eg koma tær til hjálpar, og mætari maður eri eg enn tú heldur, ikki trýtir mær gull og silvur.«

Kongasonurin fer nú avstað, valtrar bæði langt og leingi, á brøttum og sløttum, í fjøru og fjøllum. Langt um leingi kemur hann til ein stóran bý og roynir at fáa sær okkurt til arbeiðis; men tað eydnast honum ikki, hann var jú ikki vanur við at arbeiða fyri føðina. Í neyðini leitar hann upp til kongaborgina og biður um at sleppa at vera har. Hovfólkið vistu einki at geva honum at gera; men tey fingu sovorðnan tokka til hann, at hann slapp at vera. Endin var tann, at hann kom í køkin at ganga kokkinum til handa. Í fyrstuni bar hann vatn, bar brenni inn til eldin og bar øskuna út.

Einaferð eingin onnur hjálp var við hondina, biður kokkurin drongin bera matin inn á borði hjá kongi; men av tí drongurin vildi ikki vísa sítt gylta hár, tók hann ikki húgvuna av, tá ið hann kom inn. Hetta likaði kongi illa og segði við hann: »Tú má taka húgvuna av, tá ið tú kemur inn fyri kongsins borð.«

»Tað ber mær ikki til, harra kongur, tí eg havi flus í hárinum,« svarar drongurin.

Kongur bað nú ropa sær kokkin; hann kom beinan vegin leypandi; men kongurin var ikki bliður og deildi hann fyri, at hann hevði tikið ein so óhøviskan drong til hjálpar; nú skuldi hann beinan vegin koyra hann á dyr.

Men kokkinum tóktu synd í dreinginum og bar tað so í band, at hann slapp at býta um arbeiði við urtagarðsdreingin. Kongasonurin mátti nú út í urtagarðin at seta niður plantur, lúka, grava, koyra vatn á, bæði í veðri og óveðri. Ein dagin, hann arbeiddi úti, ein brennandi heitan summardag, var hann so ovbyrjaður av hitanum, at hann tók húgvuna av fyri at svala á sær; tá ið nú sólin sá á gullhárið, skein tað so fagurliga; og tað bar ikki betri á, enn at ljómin stóð beint í vindeygað hjá prinsessuni. Hon leyp til at hyggja, hvat hetta mundi vera. Tá fær hon eyga á dreingin og sær, hvussu hárið skínur. Nú leggur hon seg út av vindeyganum, rópar á hann og biður geva sær eitt blómutyssi og bera sær tað. Hann skundar sær at seta húgvuna á aftur høvdið, hentar eitt tyssi av villini blomstrum. Tá ið hann fer berandi tey, hittir hann urtagarðsmannin, sum sigur við hann:

»Hví hevur tú hentað hasi hissini blomstrini til prinsessuna? Blaka tey frá tær og far og henta eitt tyssi av teimum vakrastu og sjaldsamastu blomstrunum, vit eiga, til hana.«

»Ánei, ikki haldi eg tað, henni man dáma best villini blomstur, tí tey anga frískast og eru litfagrast.« Tá ið hann kemur inn til prinsessuna sigur hon við hann: »Tak húgvuna av, tað sømir seg ikki, at tú talar við meg undir húgvu.« »Eg kann ikki, tí eg havi flus í hárinum,« svarar drongurin. Men prinsessan rætti hondina og tók húgvuna av honum, so hansara glitrandi hár floymdi niður yvir akslarnar og var ein frøi at siggja. Hann skuldi loypa avstað, men hon tók í armin á honum og gav honum ein neva av gullmyntum. Hann tók tær við sær, men legði einki í at eiga tær, gav urtagarðsmanninum og bað lata børnini fáa tær at spæla við.

Dagin eftir rópti prinsessan aftur eftir honum og bað bera sær eitt tyssi av villini blomstrum; tá ið hann kom við teimum, skuldi hon aftur rippa húgvuna av honum, men tá helt hann við báðum hondum. Hann fekk aftur ein neva av gullmyntum, men gjørdi sum síðst, gav urtagarðsmanninum til børnini at spæla, sjálvur legði hann einki í at eiga tær. Triðja dagin hendi tað sama, drongurin mátti aftur bera prinsessuni villini blomstur, men húgvuna fekk hon ikki av, og nú vildi hann heldur ikki hava gullmyntirnar.

Stutt eftir hetta brast kríggj á. Kongur fylkti alt sítt herlið; men hann visti at figgindakongurin átti ein nógv størri her, og tí var hann dapur í huga, ræddist fyri, at honum fór at standa til tap.

Urtagarðsdrongurin vildi eisini sleppa í bardagan, segði: »Eg eri vaksin nú og vil sleppa við; gevið mær ein hest.« Hinir læðu at honum og søgdu: »Ja, bíða tú bara til vit eru farnir, vit skulu ikki gloyma at lata ein hest vera eftir til tín.« Tá ið allir eru farnir, fer drongurin út í stallin og leiðir rossið út; tá er tað eingin hestur, men ein avdeyðaryssa, bæði loðin og lamin afturat. Hetta var ein vanlukku standur, nú fór hann at verða til teiti fyri øllum hinum monnunum; men tað mátti so verða, tungur í huga saðlar hann hetta vesaladýrið, setur seg upp og fer avstað. Ryssan gongur á trimum beinum og fer skinklandi frameftir.


Nú rennir honum í hug tað ið villmaðurin segði: »Kemur tú í neyð, far so út í skógin og rópa á meg.« Nú er hann komin í neyð, og hetta skal nú roynast. Ája, hann fer skinklandi avstað á ryssuni, og tað er ikki leingi, nú er hann komin í skógarjaðaran; har støðgar hann og rópar tríggjar ferðir so hart at tað ekkóar millum trøini: »Jarnhanus!« Beinan vegin kemur villmaðurin skundisliga til hansara og spyr: »Hvat ynskir tú?«

»Eg ynski ein sterkan hest, tí nú fari eg í kríggj.«

»Tað skal tú fáa og tað, tú ikki hevur biðið um afturat.« So hvarv hann millum trøini. Um eina løtu nú kemur ein fjóskallur leiðandi ein ovurstóran og vakran hest, hann er bæði prúður og sprakin, froysir og spílar oyrini upp, dansar uttanum mannin, og aftan fyri hann kemur eitt heilt herlið av riðmonnum allir albrynjaðir, í jarni frá høvur til fót, og svørðini glitra í sólini. Kongasonurin letur seg nú í herklæðini, fjóskallurin gevir honum, so gevur hann kallinum ta lavnu ryssuna at leiða heim, setur seg so á tann prýðiliga hestin og riður so avstað á odda fyri øllum sínum monnum.

Tá ið teir koma á vígvøllin, eru nógvir av kongsins monnum longu falnir, og teimum, ið eftir stríðast, stendur til tap. Kongasonurin leggur so á figgindaherin við øllum sínum stríðskempum; teir koma sum eitt óløgi og høgga niður frá hendi, rudda slóð fyri sær, hvar teir koma, og tað var skjótt, at figgjandaherurin tók til rýmingar; men kongasonurin og hansara menn elta teir og gevast ikki fyrr enn eingin maður er eftir á lívi av figgjindanum. Tá venda teir aftur, ikki at hitta kong, men sleppa sær eftir einum umveg ósæddir aftur á skógin. Kongasonurin rópar aftur: »Jarnhanus!«

Villmaðurin kemur beinan vegin og sigur: »Hvat vil tú mær nú?«




»Her hevur tú hestin og menn tínar. Gev mær nú ta gomlu lavnu ryssuna aftur.«

»Tað skal tú fáa,« segði villmaðurin og so hvarv hann millum trøini. Um eina løtu kom fjóskallurin við ryssuni og teimum gomlu klæðunum. Drongurin skifti, setti seg á ryssuna og skinklaði heim aftur til urtagarðsmannin.

Tá ið kongurin kemur aftur úr bardaganum, kemur prinsessan ímóti honum og vil heiðra hann fyri sigurin. Tá sigur kongur: »Eg havi ongan sigur vunnið, men ein riddari kom mær til hjálpar við øllum stríðskempum sínum; tað er hann sum skal heiðrast, tí tað var hann sum vann.« Prinsessan vildi fáa at vita, hvør hesin riddari var. Nei, tað visti kongur ikki at siga, tí hann elti figgindan og bardi hann niður, og so sá eg hann ikki aftur.

Prinsessan spurdi urtagarðsmannin um dreingin. »Jú hann var rætt nú aftur komin, og hann læði at honum, »kom støplandi á tí tríbeintu ryssuni. Hinir høvdu argað hann, og spurt hvørjum steini hann krógv aði seg undir tá ið stríðið stóð. Men hann svaraði, at hann hevði stríðst manniliga, og at tað var hann, ið gjørdi, at teir vunnu; tess meira læðu teir at honum.«

Kongur sigur við prinsessuna: »Eg fari at gera eitt stórt gildi, og tú skal kasta eitt gullepli niður ímillum riddararnar. Kanska tann ókendi kemur við.«

Tá ið urtagarðsdrongurin hoyrir innbjóðingina til veitsluna, fer hann á skógin at rópa